# Ólóglig grindasøla til ES

*Fleiri hundrað grindahvalir verða dripnir og seldir ólógliga til ES-lond. Hetta er bara ikki við í almennu grindahagtølunum, sigur Paul Watson til hollendskt vikublað*

DIA MIDJORD

Øll greinin í hollendska vikublaðnum Nieuwe Revu er skrivað við einum sera ironiskum penni. Hollendski journalisturin, ið var við umborð á Ocean Warrior, førir fram sjónarmið hjá báðum pørtum. Nieuwe Revu, ið er eitt av størstu vikubløðunum í Hollandi og Belgien, hevði grindagreinina í mikudagsblaðnum.

Journalisturin skrivar eitt nú, um einsemið umborð, tí bert ein hvalur er sæddur eina heila viku. Kortini rennur pressutalsmaðurin hjá Sea Shepherd, Frank Trinkle, runt sum eitt ørt og fráboðar bæði eitt og annað: Tyrlur eru yvir skipinum, loyndarfullir, skjóttgangandi bátar nærkast. Vit verða nú jagstraðir av einum kavbáti osfr.

**Selja grind til ES**

Paul Watson verður endurgivin í greinini fyri at siga, at einans gomul fólk uttan fyri Havnina eta grind og spik. Hetta vísir journalisturin aftur, tí hann hevur spurt tjúgu ungfólk á gøtuni og flestu teirra eta grind.

Síðan førir Watson fram, at so nógv verður dripið, at tað er ógjørligt hjá 45.000 fólkum at eta hesar nøgdir. Journalisturin svarar, at sambært grindahagtølunum etur hvør føroyingur á leið 20 kilo av tvøsti um árið.

– Watson skammast slettis ikki, tá hann svarar aftur, at 100 tals hvalir verða dripnir og hildnir uttan fyri hagtølini. Hesar nøgdir verða seldar ólógliga til ES-marknaðin.



*Hesin maðurin nýtir ikki Fair-play. Hann brúkar beinleiðis lygnir fyri at fáa fleiri í sín part*

**Grindauppskrivt**

Journalisturin hjá Nieuwe Revu ger nærum grin burtur úr øllum hóvastákinum umborð við komikarum, sjónleikarum og pressufólki.

Í landi hevur journalisturin gjørt samrøður við eitt nú Olaf Nielsen og Óla Jacobsen. Og onkur føroyingur hevur bjóða honum ein grindabita. Greinin endar við uppskrivtini „hvalur á borði“, og journalisturin hevur eisini fingið eina grindalykkju við sær aftur til Hollands.

# Mads Petur farin til stroks

Sum tað sæst á myndini, so er tann eini hvalurin farin eystur um Føroyar. Spurningurn er, um Mads Petur finnur aftur til Jónhild og Katrinu, ið eru saman við restini av bólkinum. Ísak hevur framvegis ikki ringt og sagt, hvar hann er staddur. Tað var tíðliga á leygarmorgni fyri viku síðan, at sendarar vórðu festir á fýra hvalir í Sandavági.




# Grindapostur til politikarar

*Limirnir í býráðnum í Havn hava fingið teldupost úr Hollandi*

DIA MIDJORD

Teir trettan býráðslimirnir í Hava hava allir fingið teldupost frá hollendinginum Cor van de Water. Í teldupostinum heitir hesin hollendingur á føroyingar, um at steðga við grindadrápi.

Eg kann ikki góðtaka, at dýr slaktast til stuttleika. Um tit gevast og finna ein annan hátt at hátíðarhalda uppá, so verða tit aftur vird, skrivar hollendingurin.

Onkur av býráðslimunum hevur svarað teldupostinum og víst til grindaheimasíðuna hjá landsstýrinum.

# Politistabókin liðug

Fyrst í komandi viku kemur bókin um føroysku løgregluna í handlarnar. Politiið fyrr og nú er heitið á bókini, sum fyrrverandi politisturin Hjartvard Skálagarð hevur skrivað. Hann hevur seinastu tíggju árini arbeitt við bókini, sum altso nú kemur í bókhandlarnar.

# Hedvig í Smiðjuni

Hetta vikuskiftið eru nakrir og tjúgu oljumálningar og tekningar at síggja í Smiðjuni í Lítluvík. Tað er Hedvig Johansdóttir Høgnesen, ið stillar út. Seinasta hálva árið hevur pápabeiggin Kári Svensson lagt lag á hjá henni. Framsýningin endar í morgin.

# Elin fer í Smiðjuna

Frá 9. til 14. august hevur Elin Josefina Smith listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. 43 oljumálningar og tekningar eru at síggja, harímillum eisini nakrar erotiskar myndir. Áður hevur Elin havt framsýningar bæði í Danmark og í Føroyum. Men hetta er fyrsta ferðin, at hon hevur sína egnu framsýning í Føroyum.

# Skulu bara frá landi

Seinnapartin í gjár lá Ocean Warrior framvegis í Lerwick í Hetlandi. Skipaeftirlitið hevur verið umborð, og Paul Watson hevur fingið frítt at fara. Seinastu boðini, havnaskrivstovan í Lerwick hevur fingið, er at Ocean Warrior fer frá bryggju. Einki verður upplýst um, hvaðar leiðin gongur. Men mest sannlíkt verður kósin sett í føroyskan sjógv.

